## DAGSINS MEINING

# Anarki og springarar

Um 11 tíðina gjáramorgunin legði ein flokkur av springarum beinini í Sandagerði í Havn. Bólkurin varð funnin nærhendis Havnini og sjálvandi er kærkomið hjá havnarfólki at fáa feskt í pottin, nú grind hevur verið alla staðni í Føroyum, uttan í høvuðsstaðnum. Lakaíløtini eru fylt kring landið, tú kann keypa grind víða um, og nú kuldin fer at koma í luftina, so fer tú at síggja lykkjur hanga allastaðni.

Men springaradrápið í Sandagerði fyrrapartin var ódámligt, tí tað var ólógligt. Vakthavandi á politistøðini í Havn greiðir Sosialinum frá, at sýslumaðurin í Vestmanna, Ivan Klein Olsen, hevði sett bann fyri hesum drápi, men at havnarmenn ikki lurtaðu eftir. Og við ikki at akta, so hava havnarmenn stungið allar royndir í ryggin seinastu 20 árini, har vit hava roynt at bøtt okkara umdømi úti í heimi, tá velst um at veiða súgdjór úr havinum á burðardyggum grundarlagi.

Tí so skjótt sum anarki, lógloysi, kemur upp í okkara veiðu av súgdjórum úr havinum, so detta okkara grundgevingar um aldagamla rættin at veiða súgdjór úr havinum burtur. So fána grundgevingarnar burtur, tí so eru vit ikki annað enn villir barbarar, sum ikki kunnu stýrast, í hesum førinum av sýslumanninum í Vestmanna. Og ikki at akta øvrigheit, hevur ikki verið føroyingum fyri, og sømir seg okkum lítið.

Um avgerðin hjá sýslumanninum í Vestmanna var røtt ella ikki, hevur einki við málið at gera. Tá hann, sum ovasti myndugleiki, setir bann, so skal bannið haldast.

Springaradrápið í Sandagerði týsmorginin gevur náttúruverndarfelagsskapum og umhvørvisfelagsskapum vind í seglini, og ólógliga drápið ger munadygga arbeiðið hjá landsstýrinum úti í heimi til einkis. Nú er tað knappliga rætt, tað sum umhvørvisbólkar uttan úr heimi pástanda. Føroyingar jagstra djór í havinum sum tað passar teimum, á óskipaðan hátt og uttan grøna ljósið frá myndugleikunum.

Spurningurin kann nú av røttum verða reistur: Hvat skulu føroyingar við umboðan í altjóða hvalaveiðunevndini hjá IWC, tá teir ikki klára at stýra sær sjálvum, tá ein springarabólkur vísir seg í Nólsoyarfirði og sýslumaðurin í Vestmanna metir, at ongin grund er fyri at halda honum til.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# FÛlkið fryst

**Høgni Hoydal**

Ein politikkur, sum ikki vil geva fólkinum ræði í egnum landi, setur ongantíð fólkið fyrst. Hann elvir bert til, at fólkið verður fryst. Fryst úti frá at avgera sína egnu framtíð. Til frama fyri tí vanliga partapolitiska lovingarpolitikkinum, sum aftur kann rena landið á heysin og geva teimum veikastu rokningina.

Tað var við ikki sørt av spenningi, at bíðað varð eftir valskrá javnaðarfloksins. Tá størsti andstøðuflokkur í einum landi hevur arbeitt við eini veruligari valskrá, so kann væntast, at onkur nýhugsan kemur fram, og at neyvar og realistiskar ætlanir eru lagdar. Okkurt, ið kann skapa framburð, nýbrot og politiskar samstarvsmøguleikar.

Serliga spennandi fyri ein flokk, sum til seinasta val vildi hava fult sjálvstýri í Føroyum.

**Vallyfti fíggjast við hægri blokki**

Tí kundi roknast við, at javnaðarflokkurin fór at leggja eina valskrá, ið hevði greiða kós í fullveldismálinum og sum samstundis legði dent á, hvussu vit kunnu skapa eitt veruligt samhaldsfast samfelag á egnum beinum. At javnaðarflokkurin hevði síni boð uppá, hvussu vit skulu fíggja vælferðarsamfelagið, tá blokkstuðulin er burtur.

Men her varð bíðað til fánýtis. Javnaðarflokkurin borðreiðir nú við sama politikki, sum koyrdu Føroyar á heysin. Gylt vallyfti, sum flokkurin sigur bert kunnu fíggjast, um blokkstuðulin hækkar aftur. Vit lova — onkur annar rindar.

**Størstu betringar í Føroya søgu**

Hetta er harmiligt. Tí fyri fyrstu ferð í søguni. Eftir fýra ára fullveldispolitikk. Fyri fyrstu ferð hava vit ein búskap, ið hevur megnað at raðfesta almannamál, sjúkrahús, skúlar, mentan, gransking og arbeiðsmarknaðarmál hægri enn nakrantíð fyrr. Ikki við blokkstuðli, men við egnum inntøkum.

Ongantíð áður hava vælferðarøkini fingið so stóra játtan í Føroyum sum nú — hóast blokkurin er settur til viks. Hetta kann ein og hvør kanna, ið vil kenna veruleikan.

Og samstundis hava vit í flestu vinnugreinum eitt stolt vinnulív, ið ikki er heft av studningi, lánum og veðhaldum frá skattaborgaranum.

Langt er eftir á mál, áðrenn vit hava ruddað eftir kreppuna í heimastýrinum. Men hetta er besta prógvum, at fullveldi merkir, at fólkið ikki bert verður sett fremst. Nei, tað merkir, at fólkið kann seta seg sjálvt fremst. At vit kunnu býta virðini rættvísari. Tað merkir, at tað ikki eru nakrir politiskir flokkar, ið skulu seta seg sjálvan fremst og siga seg tryggja vælferðina hjá fólki við at býta út danskar pengar.

**Hví ikki føroyskar loysnir?**

Tað er tvífalt harmiligt, at javnaðarflokkurin hevur slept øllum, sum tey søgdu fyri fýra árum síðani og hevur leitað aftur til sambandspolitikkin fyri 20-30 árum síðani.

Tí summi av málum javnaðarfloksins høvdu verið uppløgd samstarvsevni, um tey vórðu sett fram í einum føroyskum fólkaræði, har vit sjálvi hava ábyrgd av at fremja og fíggja tey. Eitt nú loysnirnar á pensiónsøkinum, har vit kunnu gera ein haldgóða føroyska skipan gjøgnum Samhaldsfasta og arbeiðsmarknaðin, uttan at tengja hetta at, um eitt danskt fólkating vil játta okkum hægri blokkstuðul.

Somuleiðis kunnu vit loysa bústaðarmøguleikarnar hjá eldri og óhjálpnum, um vit halda fast við tann ábyrgdarfulla búskaparpolitikkin.

Eisini eru málini hjá javnaðarflokkinum á umhvørvisøkinum og viðvíkjandi brúkaralóggávu áhugaverd.

**Selja sál og framtíð**

Men nú vita vit so, at javnaðarflokkurin knappliga sigur seg seta fólkið fyrst — meeeen.... altso bara um Nyrup vil játta meira blokkstuðul. Sostatt hevur fólkið ongan avgerðarrætt ella nakra sjálvstøðu. Pengarnir hjá øðrum stýra. Tað svarar til, at vit skulu selja okkara sál og okkara framtíð fyri pengar, ið kunnu vera burtur í morgin.

Júst sum vit sóu, tá Føroyar fóru á heysin í 90'unum. Kom fólkið fyrst? Ella var tað kanska Den Danske Bank? Ella danska stjórnin og danski búskapurin? Ella áhugamálini hjá spekulantum?

Svarið kennir fólkið.

Og forrestin... tá ein flokkur nú sigur seg vilja seta fólkið fyrst. Hvat hevur hann sett fyrst áðrenn?

# Hvagar gongur leiðin?

**Eysturoyar Tjóðveldisfelag**

Vit liva í eini serligari tíð. Eisini politiskt. Fjølmiðlarnir tykjast at fáa alt størri og størri týdning fyri okkara støðutakan. Meðan tað er vorðið meira forkunnugt at koma á tal við politikararnar. Ofta er trupult gjøgnum fjølmiðlarnar at fáa greiðu á, hvat politisku flokkarnir standa fyri. Tað tykist ørkymlandi. Fyri mong hanga ofta fleiri ósvaraðir spurningar í leysum lofti, sum fólk ikki fáa høvi at spyrja politikararnar um.

Mikukvøldið kl. 20.00 hevur Tjóðveldisflokkurin almennan fund í bygdarhúsinum á Strondum, har umboð fyri Tjóðveldisflokkin, m.a. Høgni Hoydal, fara at greiða frá gongdini í fullveldismálinum, eins og greitt verður frá sjónarmiðum floksins á teimum mest týðandi samfelagsøkjunum.

Eisini verður nýtt ljós varpað á tann serliga og eyðkenda føroyska stuðulsbúskapin.

Á fundinum, sum er almennur, verður eisini lagdur dentur á, at øll fáa høvi at gera viðmerkingar og seta spurningar til politikkin hjá flokkinum.

Orðstýrarar á fundinum verða Eivind Jacobsen, bygdaráðsformaður, og Richard Johansen, skúlastjóri.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


# Brúkarin

Nr. 180 • mikudagur • 19. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

*Rigmor Dam*

# ¡ varing mÛti reiggjuhaldara

**Eftir at ein drongur sat fastur Ì einum reiggjustiga, ·varar Danska br˙karast˝rið ÌmÛti ·vÌsum reiggjuhaldarum**

Reigguhaldarin, sum talan er um, hevur dupultan stiga. Fjarstøðan millum tey bæði ovastu trinini eigur at verða antin styttri enn 9 cm ella longri enn 23 cm. Um so ikki er, mást tú syrgja fyri at opið verður minka, ella at tetta tað heilt, sigur Ulla Brøns Petersen frá Forbrugerstyrelsen.

Orsøkin til ávaringina er ein hending, har høvdið á einum drongi sat fast ímillum ovastu trinini. Drongurin troðkaði høvdið ígjøgnum opið, og varð fastur. Opið millum trinini er somikið stórt, at ein barnakroppur sleppur ígjøgnum, men ikki høvdið. Sostatt er vandi fyri at barnið verður "hongt".

Reiggjuhaldarin varð keyptur frá donsku handilsketuni Bilka. Men eisini aðrastaðni fann danska Brúkarastýrið reiggjuhaldarar, sum ikki lúka krøvini, um at fjarstøðan skal vera styttri enn 9 cm. ella longri enn 23 cm.: Bauhaus, Bygma, Dendek, Råd & Dåd, Byggekram, Jem & Fix, Silvan og einstakir aðrir óheftir timburhandlar.

Allir handlarnir hava nú rættað skeivleikan, og bjóða samstundis teimum, sum longu hava keypt reiggjuhaldarar, at rætta skeivleikan fyri tey.

So, um tú hevur keypt ein reiggjuhaldara og hevur illgruna um, at alt ikki er sum tað eigur, skalt tú fara aftur í handilin, sum so gevur tær tilfarið, ið nýtast skal, fyri at gera reiggjuhaldaran tryggan, sigur Ulla Brøns Petersen.

Og um trupulleikar standast av hesum í Føroyum vegna vantandi lóggávu á økinum, so er bara um at fáa skeivleikan rættaðan sum skjótast kortini, áðrenn ein syndarlig vanlukka hendir.

*Kelda: Forbrugerstyrelsen*

# Bakteriur doyggja við l·gum hita

**Hitin n˝tist ikki at vera hÊgri enn 60 ÐC skulu bakteriur Ì klÊðum burturbeinast - eisini salmonella og influensa**

Fleiri royndir vísa, at vanligt vask í vaskimaskinu við 60 flC er nóg mikið til at drepa bakteriur í klæðum. Hetta er eisini galdandi fyri salmonella í borðklútum og viskustykkjum, upplýsir danski stovnurin Forbrugerinformatión, sum hevur staðið fyri royndunum.

Orsøkin til at bakteriurnar doyggja, er at samansetingin av vaskievni og 60 flC heitum vatni drepur bakteriur, sum síðani loysast av klæðunum og verða skolaðar burtur við vaskivatninum.

Dansk Teknologisk Institut hevur gjørt vaskiroyndir við ymiskum hitastigum. Á 60 flC var nógmikið at seta klæðini á blot í sápulúti, um bakteriurnar skuldu doyggja.

Brúkaraupplýsingin heitir annars á fólk, um at skifta borðklút hvønn dag, og annars tá hann hevur verið nýttur til at turka egg, kjøtsevju ella líknandi við. Ein borðklútur eigur ongantíð at verða nýttur til viskustykki, uttan so at hann er heilt nývaskaður. Skola borðklútin væl í heitum vatni eftir nýtslu, vind hann og hang at turka.

*Kelda: Forbrugerstyrelsen*

# GÛð r·ð til keyparar

- o Les øll skjøl gjølla og bið um vegleiðing um tú ivast í nøkrum
- o Bið um skrivligt tilboð, um vøran er ein tænasta
- o Um tú keypir uppá borg - kannað endaupphæddina, áðrenn tú skrivar undir. Mangan loysir tað seg, at práta við bankan heldur.
- o Goym kvittanir

**Góð ráð, tá tú skalt keypa nýggjan dustsúgvara**

- o Dustsúgvarin skal vera léttur at seta saman og taka sundur
- o Filtur skulu vera løtt at skifta. Serstøk filtur fáast til allergi
- o Rørini skulu vera ríkiliga long. Teleskoprør, um fleiri brúkarar eru til dustsúgvaran
- o Hann skal hava langa og liðiliga slangu
- o Langan leidning, einar 12 metrar
- o Stóran posa, tað er bíligari í longdini. Men kannað at- /og hvar nýggir posar kunnu keypast
- o Bust sum kann mæla í klingur er hent til kettuhár. Kann ofta keypast afturat
- o Súgvievni sum til ber at stilla, soleiðis at hann ikki sýgur seg fastan og verður strævin at nýta
- o Goymslupláss
- o Kanna støðufesti og skap, tá ið hann stendur á t.d. trappu
- o At hann sleppur undir innbúgvið
- o Ein góður dustsúgvari kostar millum 2 og 3.000,- kr.

*Kelda: Familie og Samfund*

# Pussa brillurnar við sprinklaral¯gi

Sprinklaraløgur til bilrútar hevur sama innihald sum kostnaðarmikla brillureinsið, sum flestu brillueigarar nýta. Tú kanst velja at keypa sprinklaraløg ella at nýta hesa uppskrift til sprinklaraløg/brillureins, sum danska brúkarastýrið mælir til:
1/2 l vatn
1/2 l spritt
1 dropa uppvask
1 spsk. salmiakspiritus (8%)

# Reina uppvaskibust

Bakteriur trívast framúr væl í uppvaskibustini. Tí er skilagott at hava fleiri bustir at skifta millum. Eftir nýtslu verða tær settar í knívakurvina í uppvaskimaskinuni, so tær verða reinar og ikki heilsuskaðiligar eftir vask. Um tú nýtur somu bust alla tíðina, skal hon skáldast í kókandi vatni hvørt kvøld, áðrenn hon verður sett at turka.

Tannbustirnar kunnu eisini vaskast í uppvaskimaskinuni viðhvørt.

Bustir skulu skiftast út, tá hárini eru slitin.

*Kelda: Familie og samfund*

# Blankastu vindeygu Ì b˝num

Eini góð ráð frá einum vindeygapussara:
10 l av vatni
1 spsk. av salmiakspiritus
1 spsk. av hársjampo.

Pussa væl við rukkaðum avísum. Gevur fínar blankar rútar.


Sosialurin
-tað loysir seg